













# Eingin vandi at flyta gass framvið Føroyum

**Gassið úr tí risastóra Snøvitfeltinum út fyri Norðurnoreg, sum norðmenn skjótt fara at selja til USA og Europa, skal flytast um Atlantshavið við stórum tangaskipum. Hesi fara at sigla tætt framvið Føroyum. Statoil sigur, at har er eingin vandi á ferð.**

FLUTNINGUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá norðmenn um ikki so langa tíð fara undir at flyta stórar nøgdir av gassi í risastórum tangaskip úr Norðurnoregi til Spania og USA, koma hesi skipini at sigla tætt framvið Føroyum. Nakað herfyri reisti Anfinn Kallsberg, táverandi løgmaður fyrispurning í Norðurlandaráðnum um nettupp vandamiklan flutningum av eitt nú olju og gass og øðrum kemiskum evnum framvið Føroyum. Hann helt tað var tørvur á eini ella aðrari reglugerð ella konventión, sum hevði greiðar reglur, sum kundu forða fyri dálking eins og tað er gjørt í Norðsjónum og aðrastaðni.

Sosialurin hevur sett serfrøðingum hjá Statoil í Noregi spurningin, hvussu siglingarleiðin verður hjá hesum risastóru skipum og í hvønn mun tey kunnu vera ein dálkingarhóttan móti eitt nú føroyskum umhvørvi.

Statoilfólkini svara, at í høvuðsheitum fara øll LNG-skipini (flótandi gass) til og frá Melkøja út fyri Hammerfest í Norðurnoregi brúka siglingarleiðina norðan fyri Skotland. Bert í einstøkum førum, við serligum veðurlíkindum, fara skipini til Spania at brúka Ensku Kanalina. Men hvat norðaru rutuni viðvíkur, so vilja skipini antin sigla sunnan ella norðan fyri Føroyar. Verður rutanm norðan fyri Føroyar vald, tvs. milum Føroyar óg Ísland, er teinurin millum hesi londini 370 km (200 sjómil). Skipini fara framvið Føroyum í tryggari fjarstøðu. Verður siglingarleiðin sunnan fyri Føroyar, tvs. millum Føroyar og Skotland, brúkt, er teinurin millum londini 180 km (100 sjómíl). Eisini her vilja skipini fara framvið í tryggari fjarstøðu siga norsku serfrøðingarnir.

Víðari verður sagt, at báðar siglingarleiðirnar eru í atljóða sjógvi og verða troyttar av allari ferðslu í Norðuratlantshavi. Statoil fer fyri síni egnu skip at fyrihalda seg til tær altjóða reglur og konventiónir, sum eru galdandi fyri at sigla framvið londum og oyggjum tvs. at sigla í tryggari fjarstøðu úr landi alt eftir hvat er í lastini og út frá veðrinum.

Víst verður eisini á, at LNG skipini, sum skulu sigla Snøvit gass til Europa og USA, verða serútgjørd til at kunna sigla í hesum farvatninum eitt nú við styrktum skrokki og tí nýggjastu navigeringsútgerðini. Hædd er tikin fyri trygdini so langt tað ber til við dagsins tøkni.




*Vit síggja, at siglingarleiðin hjá stóru tangaskipunum úr Norðurnoregi til Spania og USA, gongur tætt framvið Føroyum*
*Kelda Statoil*




*Talan er um risastór tangaskip, sum fara at sigla í pendulfarti framvið føroyskum øki*
*Kelda Statoil*